# Sosialráðgevi á Almannastovuni

Søkt verður eftir sosialráðgeva til økisdeildina í Suðuroy at arbeiða fulla tíð frá 1. mai at rokna ella skjótast til ber eftir henda dag.

**Um deildina**
Á økisdeildini á Tvøroyri arbeiða 4 fólk.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er at:
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið økisdeildin serliga tekur sær av, eru
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini
- persónlig viðbót til pensionistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjónir

Økið hjá deildini er Suðuroy.

**Førleikakrøv**
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at enda sær til John Mortensen, deildarleiðara, á 353560.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera

**Almannastovuni,**
postsmoga 58,
800 Tvøroyri,

í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2003.

**Um Almannastovuna**
*Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar. Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjóns-, dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk. Almannastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landsdekkandi serdeildir.*

## *Fulltrúi*

**Toll- og Skattstova Føroya**

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

Eitt tænastumannastarv sum fulltrúi er leyst at søkja.

Høvuðsuppgávan er at samskipa alla innkrevjing hjá stovninum.

Starvið er í Eftirlits- og Innheintingardeildini í Stýrinum.

Vilt tú vita meir?

Les starvslýsingina á heimasíðu okkara

www.tollskatt.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM



## Roknskaparfólk til NORRÖNU

Søkt verður eftir roknskaparfólki til NORRÖNU. Starvið umfatar kassa-, sølu- og lønarroknskap umborð. Viðkomandi skal hava banka- ella aðra roknskaparútbúgving og hava góðan teldukunnleika.

Umsókn við prógvum og upplýsingum um royndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2004 og skulu stílast til:

***Smyril Line***
***Manningarleiðarin***
***Postboks 370***
***110 Tórshavn***

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2295, P/F Undir Klakki, 700 Klaksvík.

**Viðtøkur broyttar:** 15.10.2003
**Nýtt navn:** Sp/f Undir KLakki
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 15.10.2003 er nú gjøgnumførd.
**Kapitalur:** Kr. 190.000,00.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Vilhelm Elias Johannesen, Líggjasarbrekka 9, 700 Klaksvík (formaður), Líggjas Vilhelmsson Johannesen, Undir Klakki 35, 700 Klaksvík og Signhild Vilhelmsdóttir Joensen, 798 Trøllanes.
**Stjórn:**
**Innkomin sum stjóri:** Bethuel Frits Vilmhelmsson Johannesen, Undir Brúnni 45, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.

*Skráseting Føroya tann 6. apríl 2004*

*Kristin Balle*



Minst til haldaragjaldið...!

**Sosialurin**
Arjgjavegur 26
tel 34 18 00 · fax 34 18 01
e-mail: post@sosialurin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3311, Sp/f NYZAC, 740 Hvannasund.

**Viðtøkur broyttar:** 12.03.2004
**Nýtt hjánavn:** Sp/f Knassar (Sp/f NYZAC)

*Skráseting Føroya tann 6. apríl 2004*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2498, P/F Kemilux Industri, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 18.03.2004
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Alfred Petersen, Suðuroyarvegur 8, 100 Tórshavn (formaður), Jens Debess Petersen, Íslandsvegur 28, 100 Tórshavn, Ásbjørn Einarsson, Espigerði 2, ÍS-600 Akureyri og Baldur Ørn Guðnason, Hjarðarlundur 11, ÌS-600 Akureyri.
**Innkomin í nevndina:** Steinbjørn Hardlei, Heiðatún 3, 160 Argir og Petur Aksel Ejvind Djurhuus, Í Lon 11, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum saman við einum nevndarlimi, av tveimum nevndarlimum í felag ella av allari nevndini í felag..

*Skráseting Føroya tann 6. apríl 2004*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3755
**Navn:** P/F Asfaltverkið
**Adressa:** c/o Garðavegur 4, 660 Søldarfjørður
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 29.03.2004
**Viðtøkudato:** 29.03.2004
**Kapitalur:** Kr. 800.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 176.000,00 til kurs 113,6363636, Kontant kr. 168.000,00 til kurs 119,047619 og Kontant kr. 456.000,00 til kurs 131,5789474.
**Stovnarar:** Sp/f E.M.Asfalt, 660 Søldarfjørður (Sp/f 3525), Árni Rasmussen, Garðsgøta 13, 160 Argir, P/F Heðin Zachariasen, 435 Streymnes(P/F 1542), Elnar Rasmussen, í Toft 1, 660 Søldarfjørður, Sigmund Petur Hansen, 477 Funningsfjørður, Martin Venned, Byrgisvegur 5, 660 Søldarfjørður og Uni Mikkelsen, 650 Toftir.
**Nevnd:** Árni Rasmussen, Garðsgøta 13, 160 Argir (formaður), Edvard Højgaard Mikkelsen, 660 Søldarfjørður og Sigmund Petur Hansen, 477 Funningsfjørður.
**Stjórn:** Edvard Højgaard Mikkelsen, 660 Søldarfjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum saman við nevndarformanninum ella av samlaðu nevndini.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 29.03.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil og ídnað, herundir framleiða og selja asfalt.

*Skráseting Føroya tann 6. apríl 2004*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3299, P/F Faroe Marine Biotech, 800 Tvøroyri.

**Viðtøkur broyttar:** 23.02.2004
**Nýggjur bústaður:** 470 Eiði
**Nýggjur heimstaður:** Eiðis Kommuna
**Kapitalur:** Hækking við kr. 2.636.000,00 til kr. 3.961.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 2.350.000,00 til kurs 100 og kontant kr. 286.000,00 til kurs 350

*Skráseting Føroya tann 5. apríl 2004*

*Kristin Balle*



# Heilsufrøðingur

Heilsufrøðiskipanin søkir eftir heilsufrøðingi við fyribilssetan í Suðurstreymoy/Norðurstreymoy. Talan er um eitt starv á 40 tímar frá 1. mai 2004.

**Møguleiki:**
Arbeiðið er samansett virksemi við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økinum. Arbeiðið verður skipað m.a. við heimavitjan, ráðgeving, undirvísing og viðtalu. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða:**
Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, men til tíðir krevjandi.
Fakliga menning og skipaða supervisión.
At vera partur av samstarvstoymi.
Væntast skulu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í sambandi við menningarverkætlan.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum heilsufrøðingur.
Áhugi fyri fakligari menning.
Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna kollegiala samstarvið.

Løn sambært avtalu millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Meginskrivstovuna ella Bjartu Vilhelm, leiðara, tlf. 304020.
Umsóknarfreistin er 23. apríl 2004.

**Heilsufrøðiskipanin**
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn

*Arbeiðið hjá heilsusystrini er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva/vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlunum er arbeiðið, umframt hetta, at gera regluligar funktiónskanningar, samtala við børn, hetta bæði persónligar, bólkasamrøður og undirvísing.*

Søkt verður eftir

## mekanikarum

til at arbeiða uttanlands.

Ring 332422 millum kl. 8.00 og 16.10, ella send ein teldupost til jakup@oilwind.fo fyri at frætta nærri.

OILWIND

# Kyndil

Aðalfundur felagsins verður týsdagin 27. apríl kl. 19.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

# Heilsufrøðingur

Heilsufrøðiskipanin søkir eftir heilsufrøðingi til tíðaravmarkað starv við fyribilssetan í Vágum. Talan er um eitt starv á 20 tímar frá 15. august 2004 til 15. august 2005.

Arbeiðið er samansett virksemi við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økinum. Starvið er primært til skúlaøkið. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða:**
Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, men til tíðir krevjandi.
Fakliga menning og skipaða supervisión.
At vera partur av samstarvstoymi við positivum og engageraðum starvsfelagum.
Væntast skulu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í sambandi við menningarverkætlan.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum heilsufrøðingur.
Áhugi fyri fakligari menning.
Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna kollegiala samstarvið.

Um eingin heilsufrøðingur søkir starvið, ber til at seta sjúkrarøktarfrøðing í samstarvi við heilsufrøðing til ávísar uppgávur í tíðaravmarkað starv.

Løn sambært avtalu millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Meginskrivstovuna ella Bjartu Vilhelm, leiðara, tlf. 304020.
Umsóknarfreistin er 23. apríl 2004.

**Heilsufrøðiskipanin**
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn

*Arbeiðið hjá heilsusystrini er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva/vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlunum er arbeiðið, umframt hetta, at gera regluligar funktiónskanningar, samtala við børn, hetta bæði persónligar, bólkasamrøður og undirvísing.*



# Skrivstovuhølir til leigu

Í hesum stásiliga bygningi – tætt við sjóvarmálan, við sera góðum útsýni yvir Nólsoyarfjørð – eru ljós og góð skrivstovuhølir vit atgongd til køk til leigu. Leigumálið er uml. 90 m². Hølini eru útgjørd við edv- og telekervi.

Nærri fæst at vita hjá el&tele tlf. 354 354.

# Heilsufrøðingur

Heilsufrøðiskipanin søkir eftir heilsufrøðingi til tíðaravmarkað starv við fyribilssetan í Suðuroyar Norðaru helvt. Talan er um eitt starv á 20 tímar frá 15. august 2004 til 15. august 2005.

Arbeiðið er samansett virksemi við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økinum. Starvið er primært til skúlaøkið. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða:**
Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, men til tíðir krevjandi.
Fakliga menning og skipaða supervisión.
At vera partur av samstarvstoymi við positivum og engageraðum starvsfelagum.
Væntast skulu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í sambandi við menningarverkætlan.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum heilsufrøðingur.
Áhugi fyri fakligari menning.
Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna kollegiala samstarvið.

Um eingin heilsufrøðingur søkir starvið, ber til at seta sjúkrarøktarfrøðing í samstarvi við heilsufrøðing til ávísar uppgávur í tíðaravmarkað starv.

Løn sambært avtalu millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Meginskrivstovuna ella Bjartu Vilhelm, leiðara, tlf. 304020.
Umsóknarfreistin er 23. apríl 2004.

**Heilsufrøðiskipanin**
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn

*Arbeiðið hjá heilsusystrini er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva/vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlunum er arbeiðið, umframt hetta, at gera regluligar funktiónskanningar, samtala við børn, hetta bæði persónligar, bólkasamrøður og undirvísing.*

# Pedagogur

Barnagarðurin Sýslan søkir eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 1. mai 2004, lønarstig 10/16.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur normeraður til 36 børn við 3 stovum, 12 børnum og 2 vaksnum á hvørjari stovu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran ella varaleiðaran, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 21. apríl 2004.

**Barnagarðurin Sýslan**
FO-380 Sørvágur